# Parkeringsóskil á Reyni í Havn




## Fjórða Popplistfløgan komin

FLØGUÚTGÁVA

Fjórða árið á rað verður tikið saman um tónleikaárið, sum fór. Tey best umtóktu løgini eru savað og sett saman við kendum perlum frá undanfarnum árum á fløguni POPP LIST 4, sum Kom út í gjár.

Ongantíð fyrr hevur føroyskur tónleikur framleitt so nógv »hitt« innan so stutt tíðarskeið, sum 2005 hevur verið. Føroyskur tónleikur hevur havt fast tamarhald á fløgusølu og hittlistum her heima, og sæst hetta haftur í øllum teimum nýggju løgunum á Popp List 4. Á hesari nýggju savnsfløgu er alt frá Orkestriii her vestriii, Makrel, 200, Eivør, Deja Vu, Kim Hansen, GoGo Blues og mong onnur. Eisini síggja vit onkran gamla kenning á Popp List 4 so sum Terja & føstufressar, Papar og Kára P.

Popp List 4 er eitt savn av sonnum perlum í føroysku tónleikasøguni.

**Tað hevur volt íbúgvum úti á Reyni í Havn stórar trupulleikar, at kommunan ikki vil hava skipað parkeringsviðurskifti í gamla býarpartinum, har tað verður parkerað sum best ber til**

PARKERING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Parkeringsviðurskiftini úti á Reyni í Havn eru út av lagi vánalig. Her er púra einki skil í, tí fólk parkera bara sum best ber til, og kommunan vil einki gera, parkeringsvørðirnir hava fingið forboð ímóti at ganga her.

Soleiðis sigur John Johansen, sum býr í Reynagøtu 18 úti á Reyni í Havn.

Hann er sera misnøgdur við, at kommunan kann lata eitt øki mitt inni í sonuni í Havn soleiðis liggja í lógloysi, hvat parkering viðvíkur.

Seinastu fjórðingsøldina hava parkeringsviðurskiftini í høvuðsstaðnum verið skipað við tíðaravmarkaðari parkering í miðbýnum. Men úti á Reyni hevur kommunan gjørt eitt undantak, og hetta veldur íbúgvunum nógvar trupulleikar, tí fólk, sum arbeiða ymsastaðni kring Reynið seta bilar sínar har fyri dagin.

– Eitt vikuskiftið her fyri slapp eg ikki inn í kjallaran, tí ein bilur stóð parkeraður fyri kjallarahurðina alt vikuskiftið. Eg vendi mær til løgregluna, men teir kundu einki gera, og maðurin, sum átti bilin, var farin í Sandoynna at ferðast, sigur John Johannessen, sum hetta vikuskiftið ikki fekk motorsúkklu sína út úr kjallaranum.

Hann heldur hetta ikki vera rætt, og rópar nú varskó.

– Fyrr vóru tað fyri tað mesta heilsusystrarnar, sum arbeiða í Kristnastovu, sum parkeraðu her. Tá var trupulleikin ikki so stórur, tí vit heittu bara á tær um at flyta bilarnar, tá teir stóðu í vegin, og tað var ongantíð nakar trupulleiki. Men nú er trupulleikin so stórur, tí vit vita ikki, hvør eigur allar bilarnar, vísir John Johansen á. Hann sigur, at tað eru fólk, sum arbeiða í landsumsitingini í Tinganesi, hjá tryggingarfeløgunum, í Landsbankanum og øðrum stovnum kring Reynið, sum parkera har.

– Skuldu boð verið eftir sløkkiliðsbilum ella sjúkrabilum, so hava teir ongan kjans at sleppa forbí, sigur John Johansen.

Íbúgvar í gomlu Havnini hava fleiri ferðir vent sær til Tórshavnar Býráð fyri at fáa eina skipan í lag, soleiðis at íbúgvarnir hava møguleika at parkera. Men hesum ynski hevur býráðið blankt afturvíst, tí kommunan kann ikki gera mun á borgarum í býnum – allir borgarar skulu hava somu rættindi, sigur kommunan, sum kortini hevur gjørt eitt undantak: Tað snýr seg um løgmann og landsstýrismenninar, sum starvast í Tinganesi. Teir hava fingið eina serskipan, so teir sleppa at parkera so leingi teir vilja.

Men hesi rættindi heldur Tórshavnar Kommuna ikki, at tey sum búgva á Reyni í Havn skulu hava.


*Eitt vikuskiftið slapp John Johansen ikki inn í kjallaran, tí ein bilur stóð parkeraður fyri kjallarhurðina alt vikuskiftið*

*Mynd: John Johansen*


*Fólk sleingja bilarnar sum best ber til og lata teir standa fyri dagin, meðan tey eru til arbeiðis*

*Mynd: John Johansen*

# Skeivir upplýsingar um landingar uttanlands

**Tíðindini um føroysku ísfiskalandingarnar uttanlands, sum Vinnuhúsið hevði á heimasíðu síni við Fiskiveiðieftirlitinum sum keldu, vóru ikki røtt**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Vit harmast um at hava skrivað tíðindini við skeivum upplýsingum. Feilur var í tølunum frá Fiskiveiðieftirlitinum, og tað harmast vit um, sigur Vinnuhúsið.

### Lítil munur

Røttu tølini vísa, at landingarnar uttanlands 9 teir fyrstu mánaðirnar í ár eru umleið 11.000 tons. Aftrat hesum koma tey umleið 6.000 tonsini av upsa, sum russisku trolararnir tóku ímóti í fyrr í ár.

- Tað merkir, sigur Vinnuhúsið, at beinleiðis landingarnar uttanlands, saman við landingunum til russisku skipini, eru á leið tað sama higartil í ár samanborið við sama tíðarskeið seinasta ár.

### Minni í prosentum

Taka vit fiskiskapin higartil í ár í mun til fiskiskapin somu tíð seinasta ár, eru landingarnar í prosentum av veiðini nakað minni í ár enn seinasta ár.

- Soleiðis góvu tølini frá Fiskiveiðieftirlitinum, sum vit løgdu út á heimasíðuna mánadagin, eina skeiva mynd av støðuni, sigur Vinnuhúsið og harmast um hetta.


*Ísfiskalandingarnar uttanlands í ár eru ikki so stórar í nøgd, sum Fiskiveiðieftirlitið vildi vera við*




Tórshavn
Ítróttarhøllin á Hálsi
Fríggjadag
28. Oktober
Kl. 19

Klaksvík
Ítróttarhøllin
Leygardag
29. Oktober
Kl. 16

Runavík
Ítróttarhøllin
Sunnudag
30. Oktober
Kl. 16

ARENA
NORDENS STØRSTE CIRKUS
Forsøla av atgongumerkjum í Bónus
og við dyrnar ein tíma undan sýningunum